## Páll Mohr Joensen við til Íslands

Virkandi A-landsliðsvenjarin í fótbólti, Heðin Askham, hevur tikið Páll Mohr Joensen úr HB út til landsdystin á útivølli ímóti Íslandi sunnudagin. Í Klaksvíkskappingini um vikuskiftið varð Arnbjørn Hansen úr EB/Streymi skaddur og noyddist at geva avboð til Íslandsdystin, og tí hevur Páll fingið hansara pláss í hópinum. Páll Mohr Joensen hevur spælt á ungdómslandsliðunum, men er ikki fyrr úttikin til A-landsliðið.



## Hvirlan bjóðar venjarum skeið

Nýggja felagið við frælsum ítrótti í Havn, Hvirlan, bjóðar nú venjarum sínum á skeið. Tað verður svenski instruktørurin í frælsum ítrótti, Daniel Bergin, sum fer at standa fyri einum skeiði tvey vikuskifti, sum verða 28./29. mars og 25./26. apríl. Tey, sum fullføra skeiðið, fáa eina skeiðsváttan, sum svarar til ta, svenska sambandið fyri frælsan ítrótt gevur sínum barna- og ungdómsvenjarum. Skeiðið fevnir um ástøðiligan og verkligan kunnleika til at skipa venjing fyri børnum og ungum í aldrinum 7-14 ár.

# Ungir og óroyndir íslendingar

**Fýra útisetar eru við í íslendska hópinum, sum skal spæla móti Føroyum sunnudagin**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Ólafur Jóhannesson, íslendskur landsliðsvenjari, hevur valt sínar 18 mans, sum sunnudagin í Kórinnhøllini á Kópavogi skulu royna seg í altjóða venjingardystinum ímóti Føroyum.

Talan er um eitt ungt og óroynt landslið, tí átta av leikararunum hava ongantíð áður umboðað Ísland í altjóða dysti, meðan hinir 11 hava spælt 43 landsdystir tilsamans.

Fýra útisetar eru við í íslendska hópinum. Teir eru Guðmundur Reynir Guðmundsson og Eyjólfur Heðinsson úr svenska felagnum GAIS, Jóhann Berg Guðmundsson úr hollendska AZ Alkmaar og Rúrik Gislason úr danska Viborg.



*Bjarni Ólafur Eríksson úr Vali er við sínum 11 landsdystum tann mest royndi leikarin hjá íslendingum ímóti føroyingum*

### Íslendski hópurin

**Málverjar**
Stefán Logi Magnússon, KR (2 landsdystir)
Tórður Ingasson, Fjölnir

**Verjuleikarar**
Bjarni Ólafur Eríksson, Valur (11 landsdystir)
Atli Sveinn Tórarinsson, Valur (8 dystir)
Ásgeir Gunnar Ásgeirsson, FH (3 dystir)
Guðmundur Reynir Gunnarsson, GAIS (1 dyst)
Guðjón Árni Antoníusson, Keflavík

**Miðvallarar**
Davíð Tór Viðarsson, FH (6 dystir)
Jónas Guðni Sævarsson, KR (5 dystir)
Eyjólfur Héðinsson, GAIS (3 dystir)
Matthías Guðmundsson, FH (3 dystir)
Jóhann Berg Guðmundsson, AZ Alkmaar (1 dyst)
Guðmundur Kristjánsson, Breiðablik
Gunnar Már Guðmundsson, Fjølnir

**Framherjar**
Guðjón Baldvinsson, GAIS
Matthías Vilhjálmsson, FH
Óskar Örn Hauksson, KR
Rúrik Gíslason, Viborg



*HB og NSÍ møtast longu í fyrsta umfari í kappingini um Løgmanssteypið*

## HB og NSÍ møtast í steypakappingini

Lutakastið til kappingina um Løgmanssteypið, sum var í 3-2 í gjárkvøldið, lagaði tað soleiðis, at tvey av fremstu liðunum seinastu árini bresta saman í fyrsta umfari:

**Undanumfarið tann 28 mars:**
Dystur 1. Royn - Undri
Dystur 2. MB - Skála
Dystur 3. TB - NÍF

**1. umfar tann 9 apríl:**
Vikingur-MB/Skála
AB-B68
FC Hoyvík-Royn/Undri
TB/NÍF-B36
KÍ-07 Vestur
B71-ÍF
HB-NSÍ
VB/Sumba-EB/Streymur

# Knørrur innanhýsis kapping í inniróðri

Róðrarfelagið Knørrur hevur í vetur skipað fyri prix-kappingin í inniróðri, hvørs endamál serliga er at menna ungdómspartin í felagnum. Tó hava allir aldursbólkar í felagnum verið við hesi seks umførini, sum hava verið í vetur. Seinasta umfarið var leygardagin, tá steyp og heiðursmerki vórðu handað vinnarunum, sum síggjast niðanfyri.



*Tríggjar tær bestu Knørragenturnar í bólkinum U15. Frá vinstru Maria Tórgarð, Lilja Luid og Anna Louisa Rubek Nielsen*

**U15-gentur**
1. Lilja Luid
2. Anna Louisa Rubek Nielsen
3. Maria Tórgarð

**U15-dreingir**
1. Hallur Nattestad
2. Sverri Skaalum
3. Mækir Sjúrðarson í Jákupsstovu

**U18-gentur**
1. Johanna Petersen
2. Gunnvá Fossaberg Ellingsgaard
3. Anna Midjord

**U18-dreingir**
1. Hanus á Tjaldrafløtti Vestergaard
2. Osvald Hansen
3. Petur Dahl Wardum

**Kvinnur**
1. Cerina Dalfoss
2. Sóleyð Eyðunsdóttir Poulsen
3. Rebekka á Neystabø Jacobsen

**Menn**
1. Jens Michal Tróndheim
2. Helgi Øster Petersen
3. Pætur Johansen